# Virkistalið er fleirfaldað

**Samlaðu lønarútgjaldingarnar ífiskiídnaðinum og í alivinnunui og kryvjivirkjunum var í fjør omanfyri eina hálva milliard. Tað svarar til millum 2700 og 2800 ársverk**



*Undan kreppuni vóru stívliga tjúgu fiskavirkir, meðan talið á virkjum, sum fáast við viðgerð og hagreiðing av fiski nú man liggja ikki langt frá teimum hálvt hundrað.*

FISKIVINNA
*Jóannes Hansen*

Seinastu tíggju árini er Føroya kortið vorðið nógv meiri fjøltáttað, tá tað snýr seg um flaka– og fiskavirkir. Undan kreppuni vóru stívliga tjúgu fiskavirkir, meðan talið á virkjum, sum fáast við viðgerð og hagreiðing av fiski nú man liggja ikki langt frá teimum hálvt hundrað. Í Ráfiskakeyparafelagnum eru 30–35 limir. Summir av limunum eiga fleiri virkir, og onkrir av teimum, sum keypa fisk og viðgera hann meiri og minni, eru ikki limir í felagnum.

Í fleiri førum eru skipini eisini fiskavirkir. Her verður hugsað um eitt nú flakatrolararnar, sum royna eystanfyri og um Næraberg. Felags fyri allar hesar er, at teir eru flótandi verksmiðjur.

Sambært hagtíðindum vóru samlaðu lønarútgjaldingarnar frá januar og til november í fjør 482 milliónir tilsaman í fiskiídnaðinum og ali– og kryvjivirkjunum. Um vit siga, at desember í fjør royndist, sum desember í fyrraárið royndist, og um vit leggja lønarhækkingina afturat, so var samlaða lønarútgjaldingin í nevndu vinnunum í fjør umleið 530 milliónir krónur. Hetta svarar til onkra staðni millum 2.500 og 3.000 ársverk. Kanska er eitt neyvari tal 2.700 – 2.800. Tá eru alibrúkini og smoltstøðirnar, sum ikki eru við í hesi greinini, roknað uppí, og tað eru verksmiðjuskipini heldur ikki.

Í øðrum vinnum, sum so at siga liva av fiskavirkjunum, eru eisini nógv arbeiðspláss og harvið stórar lønarútgjaldingar. Tað økið, har vøksturin hevur verið eina strørstur seinnu árini, er í sambandi við flutning av fiski. Menningin í alingini og tað at uppboðssølan varð sett á stovn hava havt tað við sær.

## Á fleiri plássum

Støsta einstaka partafelagið, sum keypir og arbeiðir fisk er Føroya Fiskavirking. Vanliga plagar at vera sagt, at teir keypa ein triðing av samlaðu nøgdini – eitt sindur meiri av summum fiskasløgum og eitt sindur minni av øðrum. Tá verður ikki roknað við Havsbrún í Fuglafirði og Rækjuvirkinum á Oyri, sum arbeiða pelagiskan fisk og rækjur og skeljar.

Føroya Fiskavirking hevur virki á Toftum, í Runavík, í Vestmanna, í Havn, í Miðvági og á Tvøroyri. Teir leiga eisini Roykivirkið í Álakeri. Fiskavirking eigur framvegis virkið í Vági, sum teir hava langtíðar útleigað. Á Toftum arbeiða teir saltfisk, í Runavík fyrst og fremst frystan blokk, í Vestmanna portiónir úr upsa, í Havnini portiónir og blokk úr triðja lands fiski, í Álakeri smáan upsa og hýsu, í Miðvági interleaved (blokkpakkað fløk við pakningini millum hvørt einstakt flak) og á Tvøroyri arbeiða teir djúpvatnsfisk.

Kósavirkið arbeiðir saltfisk, portiónir og blokk. JFK, sum eigur Kósavirkið, eigur saman við øðrum Pure Water, sum er gamla Roykivirkið í Klaksvík. Millum annað vakumpakka teir til detailmarknaðin.

Jóhan Páll Joensen og Johan Dávid Joensen í Klaksvík eiga saman við øðrum fleiri virki. Í Klaksvík er talan um Salmut, sum burturav er eitt saltfiskavirki. Á Eiði verður mest framleitt burturúr hýsu, í Sørvági er talan um eitt saltfiskavirki, Vestís, sum teir reka (Vesturvón eigur virkið), og í Hvalba skulu teir arbeiða djúpvatnsfisk.

Delta Seafood á Tvøroyri er eitt saltfiskavirki, sum eisini fæst við eitt sindur av feskum. Teir eru eisini uppi í Sandoy Seafood á Sandi og í Skopun, har virkini ávikavíst eru saltfiskavirki og flakavirki, sum frystir í blokk.

## Nógv servirki

Umframt hesi eru ein rúgva av øðrum virkjum. Summi eru størri, og summi eru smærri. Rákið tykist vera, at virkini, sum koma afturat, ofta eru sovorðin, sum serliga leggja seg eftir einari ávísari framleiðslu. Okkum hevur ikki eydnast at fáa nakað fullfíggjað yvirlit. Men kortini loyva vit okkum at nevna nøkur av virkjunum, soleiðis at í hvussu so er ein hilling kann fáast á, hvussu nógv virksemi er kring landið.

Í Norðoyggjum er Norfra í Norðdepli flakavirki, sum frystir í blokk, og í Árnafirði hevur Norðurfisk lagt seg serliga eftir at arbeiða smáan fisk. Teir eru eitt nú kendir fyri raspaðu hýsufløkini. Í Klaksvík byggja Eystlaks og Faraoe Salomon í felag kryvjivirki, og í bygninginum hjá Anthonius Olsen, har stór frystigoymsla, verður laksur kruvdur og pakkaður.

Í Leirvík arbeiðir Tavan gulllaks, tá tann vertíðin er, og so arbeiða teir eisini upsaportiónir. Úti á Hagaleiti er nýggja virkið, Faroe Marine Products, sum virkar burturúr høvdum. Flakavirkið hjá Kjartani Joensen frystir blokk og arbeiðir feskan fisk, og í Gøtu er Fiskavirkið – umframt at vera kryvjivirki fyri alifisk – eisini saltfiskavirki og virki, sum arbeiðir feskan fisk.

Í Fuglafirði eigur Havsbrún gamla Handils– og Frystivirki. Eystlaks hevur virkað laksaportiónir har. Á Skálafjørðinum er ein røð av fiskavirkjum: Á Bakka á Glyvrum hava teir kryvjivirki til alifisk, umframt at teir framleiða í portiónum. Í Runavík arbeiðir Nevið serliga havtasku og onnur fiskasløg, sum stóru virkini ikki gera so nógv við. Dygst undir liðini á Fiskamarknaðinum á Toftum eru Snodd og Valhalla, sum senda nógv feskt av landinum. Hinumegin fjørðin er saltfiskavirkið Vaðhorn og kryvjivirki er í hølunum, har flakavirkið Bátafisk á Strondum fyrr var.

Í Kollafirði hevur Vestlaks kryvjivirki, og Í Kaldbak arbeiðir Kaldbak Seafood, sum sølufyritøkan Farex er uppií, feskan fisk. Í Haldórsvík arbeiðir FarIta saltfisk og feskan fisk í gomlu hølunum hjá Víkavirkinum, og í Vestmanna er kryvjivirkið Atlantis. Í Skálavík er eitt rímuliga nýtt fiskavirki hjá Linjohn Christiansen.

Í Suðuroy hevur Heri Hjelm roykivirki í Porkeri. Í hølunum, sum Fiskavirking eigur í Vági, hevur Heri Hjelm stórt laksavirki.Og harafturat hava seinnu árini onnur onnur virki sæð dagsins ljós í Vági – eitt nú saltfiskavirkir.



*Nógv fólk arbeiða í dag í fiskivinnuni*









